Summar FESTIVALUR - har hittini hittast



FESTIVALTÍÐINDI við Ragnhild Ellingsgaard

Summarfestivalur 2009:

# Eitt brak av einum festivali

**Stórar produktiónir, nýggjar upplivingar og hugnaligar umstøður verða nøkur av lyklaorðunum hjá Summarfestivalinum 2009**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Um 24 dagar verður Føroya størsti festivalur skotin í gongd við einum braki av eini festivalskrá. Hesin verður tann sætti í røðini - og við nøvnum sum Robin Gibb, Boys In A Band, Nik & Jay, Chase, Abba The Show, Frændir og fleiri øðrum skuldu øll tekin verið í luftini fyri, at dagarnir frá 6. august til 8. august fara at teljast millum teir heilt góðu í ár.

Men hvussu gongur við øllum? Eru fyrireikingarnar farnar í gongd? Verður nakað øðrvísi á skránni? Vit hava hitt ein av fyrireikarunum, Erik Biskopstø, til eitt lítið prát og lovar hann, at hetta árið verður betri enn nakrantíð fyrr.

- Endamálið hjá okkum er at gerast betri og betri fyri hvørt ár. Longu nú er staðfest, at ljóðanleggið í ár verður størri í mun til undanfarin ár - og festivalurin í ár verður eisini øðrvísi á tann hátt, at vit ongantíð fyrr hava havt so stórar tónleikarligar produktiónir á skránni. Millum annað koma vit at uppliva strúkarar frá London Philharmonica Orcestra, tá Abba The Show fara í gongd og Robin Gibb hevur sent boð um, at hann ætlar at brúka stórar videoskermar á pallinum sum ein part av tí visuellu upplivingini. Hetta er alt nakað, sum vit ikki hava roynt fyrr – og ikki minst krevur hetta nógv av okkum sum fyrireikarar, tá mesta útgerðin skal finnast uttanlanda, greiðir Erik frá.

Av somu orsøk hava fyrireikararnir tilvitað valt ikki at taka fleiri útlensk nøvn á skránna, tá stóru produktiónirnar á pallinum inni-



*Erik Biskopstø, fyrireikari, tosar við arbeiðsmennirnar á Summarfestivalinum 2008*

bera nógv arbeiði og góða tíð millum tey ymsu skiftini.

Eitt heilt nýtt upplivilsi bíðar harumframt teim ungu, tá festivalurin longu hóskvøldið leggur til brots við donsku Nik & Jay. Teir koma til Føroya við einum heilt nýggjum showið, sum fyri tað mesta er rættiliga dj-kent.

- Tað ber ikki til at hugsa tradionelt, tá tú hugsar um Nik & Jay. Teir koma við eini heilari ungdómsmentan, sum vit eru stolt av at kunna bjóða teim ungu á Vágsbøi. Showið hjá teimum verður uttan iva nakað at gleða seg til, sigur Erik Biskopstø og leggur afturat, at eisini Flagstjaldið fær nýtt skap, tá pallurin í ár flytir frá einum enda til annan.

- Pallurin hevur øll árini ligið í sama stað, men í ár flyta vit hann so hagar, har inngongdin annars hevur verið. Hetta gevur betri atkomumøguleikar til góðu toilettviðurskiftini í fótbóltsskýlinum og lættari atgongd hjá tónleikarunum til backstage-hølið.

Ikki minst er minni hall á undirlagnum hesu megin tjaldið, so hetta verður uttan iva ein góð loysn fyri allar partar, heldur hann.

Sjálvt festivaløkið fer annars at líkjast sær sjálvum við hugnaligum matstøðum og sølubúðum av alskyns slag. Millum annað verður ein tattoveringsbásur, har tú kanst fáa tær eitt festivalminni á kroppin og tiltiknu festivalbúffarnir frá Hotel Norð verða eisini at fáa.

- Vit leggja okkum eftir at skapa eitt umhvørvið, har øll familjan kann fáa okkurt. Børnini kunnu fara ein túr í Silvaland, sum við tíðini er vorðið ein lítil festivalur í sær sjálvum. Her verður tónleikur og ikki minst fleiri ókeypis tilboð til teir yngstu gestirnar. Tey ungu fáa møguleika til at stuttleika sær við fleiri fjølbroyttum upplivingum og tey tilkomnu skulu kunna seta seg niður við onkrum góðum til matna. Alt hetta verður so krydda og blanda saman við tónleiki; útlendskum sum føroyskum. Gamalt og nýtt verður blanda saman, kendir og ókendir tónar fær fólki at savnast og eftir er bara at njóta lívið. Soleiðis hevur tað verið øll árini – og í ár verða tilboðini betri enn nakrantíð, lovar Erik Biskopstø, sum longu nú hevur úr at gera við fyrireikingum til ársins brak av einum festivali.



## Robin Gibb minnist Michael Jackson

Bee Gees telist millum 10 tey mest seljandi tónleikanøvnini í søguni. Frammanfyri teir finna vit m.a. Michael Jackson, sum fyri stuttum andaðist. Robin Gibb metti Michael at vera ein góðan vin og hevur sum eina seinastu heilsan til poppkongin sent út hetta skriv:

- Vit hava ikki bara mist ein góðan vin. Vit hava eisini mist eitt fantastiska kensluborið menniskja. Bee Gees hoyrdi tónleik við somu oyrum sum Michael Jackson. Hann hevði eina framúr góða rødd og milliónir av fólki, sum enn ikki eru fødd, fara at syngja hansara sangir. Hetta eigur at læra okkum at virðismeta og viðurkenna slíkar gávur, meðan vit framvegis hava tær millum okkum. Um vit, meðan hann enn var á lívið, høvdu givið honum bara ein part av tí heiðuri og tí viðurkenning, sum hann hevur fingið eftir sín deyða, so var hann kanska ikki deyður nú. Tað er ein syrgiligur sannleiki. Ein troyst er tó, at hansara eftirmæli fer at siga.

Við hesum orðum ynskti Robin Gibb at minnast Michael Jackson, sum, eftir hansara tykki, doyði alt ov tíðliga.

## Robin Gibb sum frímerki

Robin Gibb, sum í næsta mánaði skal spæla øll tey stóru hittini hjá Bee Gees á Vágsbøi, legði í seinastu viku leiðina fram við Isle of Man, har hann varð føddur.

Orsøkin til hetta var, at postverkið á Isle of Man hátíðarhelt 50 ára stovningardagin hjá bólkinum, sum verður mettur at vera ein av mætastu poppbólkunum í søguni. Í hesum sambandi hava tey framleitt eina heilt serliga røð av frímerkjum og høvdu tey eisini bjóðað brøðrunum báðum, Robin og Barry Gibb, at hátíðarhalda løtuna saman við teimum.

Bæði Robin og Barry vóru við í bólkinum Bee Gees; ein bólkur, sum legði ein stóran part av heimum undir sínar føtur, tá teir borðreiddu við hitti omaná hitti.

Um onkur hevur hug at hyggja nærri eftir frímerkjunum – ella kanska at keypa tey – kann hetta gerast á heimasíðuni www.iomstamps.com.



**Við spurningum í lummanum hittir Ragnhild Ellingsgaard hvønn dag nýggj fólk á gøtuni. Í dag er tað Dia Jacobsen úr Havn, sum stendur fyri skotum. Dia arbeiðir í Grønlandi, hevur verið á 5 Summarfestivalum og ætlar hann sær aftur á Vágsbø í ár**



**1. Hvør er orsøkin til, at tú ætlar tær aftur á SF í ár?**

*Summarfestivalurin er nú einaferð Føroya størsti festivalur. Hann hevur tey størstu nøvnini og har koma nógv fólk. So tað er ein góð blanding av góðum tónleiki og hetta at hitta fólk, tú kennir.*

**2. Hvør hevur verið tín besta tónleikaliga uppliving á SF?**

*Scorpions á Vágsbøi í 2007. Ikki langt aftanfyri koma Dynamit, sum totalt rokka, duga væl at enda ein festival og ikki minst at fáa fólkið við. Sleppi heldur ikki undan at nevna Hanus Johansen, sum hvørja ferð borðreiðir við eini super uppliving.*

**3. Liggur tú í tjaldi ella ordiligari song á SF?**

*Eg havi ongantíð enn tjalda á Summarfestivalinum, sjálvt um tað eisini kundi verið ein uppliving í sjálvum sær. Eg vænti tó, at eg sovi í eini ordiigari song hjá onkrum, sum eg kenni.*

**4. Hvør er løgnasta upplivingin, tú hevur havt á SF?**

*Tað man uttan iva vera í 2007. Um dagin vitjaði eg fólk og sum vera man vóru klaksvíkingar sera blíðir. Hetta var tíðliga um dagin og veðrið var fínasta slag. Men sum flest øll minnast versnaði bara út á dagin. Tá leið móti kvøldið vóru eg og nøkur vinfólk farin á Maverick, har sangur og gott lív var – og uttan veruliga at hava varnast nakað, var veðrið fari frá at vera ringt til at vera orkan.*

*Eg visti av ongum og fór út at svala mær á. Beint tá koppaðoi stóra teltið og ein sløkkiliðsmaður kom rennandi eftir mær. Hann bað meg skunda mær burtur, tí leysir lutir foku runt í vindinum. Tástani gekk upp fyri mær, hvussu ringt veðrið var og at allar konsertir vóru avlýstar restina av festivalinum…*

**5. Hvønn kundi tú hugsað tær at hoyrt á SF 2010?**

*Eitt realistiskt boð kundi verið Kim Larsen ella The Dubliners. Hesar havi eg dámt síðani fyrstu ferð, eg hoyrdi teir.*